Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Borðtennis í 25 ár

**Leygardagin 19. november skipaði Borðtennissambandið fyri almennari móttøku í Listaskálanum.**

MÓTTØKA
*Orð/myndir: Snorri Brend*

Henda móttøkan varð hildin í samband við at 25 ár vóru liðin, síðani hetta sambandið varð sett á stovn.

Nógvir fyrrverandi og núverandi borðtennisleikarar og onnur áhugað vitjaðu inn á gólvið fyri at vísa sambandinum heiður á stóra degnum.

Umframt sjálva móttøkuna so var sjálvandi eisini ítróttur á skránni. Fyrr um dagin varð nevniliga hildin ein jubileumskapping í Eysturskúlanum í einmansleiki og tvímansleiki í øllum deildum.

Umframt allar hesar kappingarnar so skipaði Borðtennissambandið eisini fyri eini serstakari kapping, har fyrrverandi leikarar kundu kappast bæði innan Old Girls og Old Boys.

Nevnast kann, at Borðtennissambandið eigur bæði gamlar myndir og gomul skjøl. Til skjals er nevniliga ein mynd av fyrsta dystinum sum leiktur varð í Føroyum, tá borðtennishugaðir Kyndlamenn og Tvøroyrar Borðtennisfelag leiktu dyst í 1957.

Sagt verður, at tvøramenn leiktu við meiri nútíðar battum við gummi á síðunum, meðan havnamenninir høvdu træsíður. Tann dystin vann TBF 4-2.



*Fyrri um dagin varð hildin ein jubileumskapping fyri tey yngru og tey eldru. Hesi vóru eisini við, og fleiri heiðursmerki vórðu vunnin*



*Nógv fólk vitjaðu á móttøkuni – vm. Heðin Mortensen, Petur Elias Petersen, Niels Jákup Jakobsen og Heri Ziska*



*Nógv áhugavert er at finna í gomlum skjølum hjá Borðtennissambandinum – vm. Jógvan Arge og Árni Dahl*




*Myndin er tikin í sambandi við fyrsta borðtennisdystin í Føroyum, sum varð leiktur í 1957 í Havn millum Kyndil og TBF á Tvøroyri. Leikararnir vóru: vm. Hendrik Rubeksen, Pole Rasmussen, Vagnar Olsen, Torbjørn Mikkelsen, Anfinn Rubeksen Nielsen og Harry Johansen úr Kyndli, og Thorolf Dam, Sverre Midjord, Niels Midjord, Niels Pauli Niclasen og Sigurbjørn Niclasen av Tvøroyri. Nevnast kann, at kyndlamenninir leiktu við meiri nútímans battum við gummi á síðunum, meðan tvøramenn høvdu træsíður. Hóast hetta, so vunnu tvøramenn dystin 4-2*